## BÚMERKJAKAPPING

Krígssavnið /War Museum bjóðar við hesum til kapping um búmerki til savnið.

Savnið hevur til endamáls at lýsa krígsárini 1940-45.

Fyribils húsast savnið í leigaðum hølum í Miðvági, men ætlanin er at flyta savnið inn í S.O.R.-bygningin við gamla flogtornið oman fyri flogvøllin.

Búmerkið skal nýtast á heimasíðu, brævbjálvum/-pappíri, plakatum, lýsingum og øðrum, ið Krígssavnið letur úr hondum.

Búmerkið skal hava ein einfaldan, greiðan stíl, sum ímyndar virki krígssavnsins.

Støddin á tekningini skal vera uml. 21x 29 cm (A4).

Búmerkið skal hava í mesta lagi 3 litir á hvítari bakgrund. Tekningin skal kunna minkast í stødd til uml. 1,5 x 1,5 cm. Harumframt skal búmerkið vera egnað til at prenta í svørtum/hvítum.

Til at meta um innkomnu uppskotini er sett henda dómsnevnd:

Astrid Mouritsen, Regin Davidsen og Herálvur Jacobsen

Tveir vinningar verða latnir; hvør vinningur er 1 flogferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Atlantic Airways letur vinningarnar.

Nevndin í Krígssavninum heimilar sær rætt til at velja millum innkomnu uppskotini ella einki av teimum at nýta.

Uppskotini skulu vera Krígssavninum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2009.

Navn skal ikki standa á tekningini, men eitt fimmsifrað tal setast á baksíðuna á tekningini. Navn, bústaður og telefonnummar verður lagt við í afturlatnum brævbjálva, sum hevur sama tal sum á tekningini.

**Krígssavnið**
v/ Karl Jóhan Nielsen
Torvgøta 10
FO-385 Vatnsoyrar
Tlf. 33 20 41 · fartlf. 26 60 41
t-post: kjn@post.olivant.fo

## Aðalfundur

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya verður **leygardagin 21. februar 2009 kl. 10.00** í FSF-húsinum.

Fundarskrá sambært lógunum.

Fótbóltssamband Føroya

www.fsf.fo

RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

## Lærarastarv í Runavíkar kommunuskúla

Í tíðini frá 04. januar til 30. juni 2009 er eitt starv sum avloysari fyri lærara í farloyvi leyst at søkja í Runavíkar kommunuskúla.

Í tímatalvuni eru tímar í støddfrøði í 8. fl., alisfrøði í 7., 8. og 10.fl., evnafrøði og føroyskt í 10.fl.

**Lønartreytir**
Starvið er lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjamálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. desember 2008, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið frá Duritu P. Joensen, skúlastjóra á tlf. 477331 & 217331 ella Ingvard Lamhauge, varaskúlastjóra á tlf. 477331 & 586007.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur hetta skúlaárið um 441 næmingar og um 55 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

## ÍBÚÐ TIL SØLU

Um hóskandi boð fæst, selji eg íbúð mína á Berjabrekku 37.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 322 524**

## Hús til sølu

Um nøktandi boð fæst, eru húsini við Kongagøtu 1 til sølu.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 21 72 72**

## KEYP GRÝTUKLÁRAR DUNNUR OG GÆS




**Dunnur uml. 2-3 kg. Gæs uml. 5-6 kg.**
**AVMARKAÐ NØGD.**
**ØYVIND LÜTZEN**
**Tel. 311782 / 211782**

## Advokatfelagið við Strond 4

ynskir øllum viðskiftafólki sínum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Skrivstovan er stongd frá 20. desember 2008. Opið verður aftur mánadagin 5. januar 2009.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

## TVINGSILSSØLA

Tvingsilssøla verður av einum sethúsum, matr. nr. 126, Hvalvík, í rættsali IV, undir Glaðsheyggi 14, Tórshavn **týsdagin tann 20. januar 2009 kl. 13.45** eftir áheitan frá Heygum & Petersen, advokatum.

Sethúsini eru eini Bloch Vatne typuhús, bygd í 1974. Tey eru 132 m² til víddar í tveimum hæddum.

Ovara hæddin er innrættað soleiðis: Gong, køkur, tvær stovur, trý kømur, hjúnarúm og baðirúm við brúsu.

Í niðaru hæddini eru gong, fýrrúm, køkur, trý kømur og baðirúm við brúsu.

Takið er skift í 1997 og er úr eternit. Kjallaravindeyguni eru skift í 1998.

Garasja við hjalli er bygd upp í húsini.

Økið er 2244 m² til víddar.

Ognin verður seld sambært vanligum tvingsilssølutreytum.

**Sorenskriveren på Færøerne,**
**tann 12/12-08**

## Selja bilin?

– set hann í Sosialurin!

Ring og fá ein prís!



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**